# ANA FANGAÐI NIBE Í SÍNUM NETI



*Svenska Ana Johnsson legði Nibe Festivalin fyri sínar føtur við eini frálíkari framførslu í Bláa Pallinum*

Hon gjørdist kend, tá ið hon sang ein sang til Spider Man, men hon kann nógv meira enn tað. Ana Johnsson setti tvær tjúkkar strikur undir sítt navn, tá ið hon spældi í Nibe

Framførslan hjá Ana Johnsson á Nibe festivalinum var professionell, flirtrandi og framúr.

Svenska poppstjørnan, sum av álvara gjørdist kend, tá ið hon sang sangin We Are til næsta filmin um Spider Man, spældi popputan rock í stóra teltinum í Nibe.

Ana skrivar sjálv tónleik, men hon hevur eisini fingið hjálp frá teimum fremstu svensku framleiðarunum til at skriva sangir og framleiða. Menn sum Andreas Carlsson og Max Martin eru víðagitnir fyri at skriva hitt til stjørnur sum Britney Spears, Backstreet Boys, Bon Jovi og onnur, og teir hava verið upp í leikinum í tónleikinum hjá Ana Johnsson eisini.

Úrslitið av tí er tónleikur, sum fungerar væl á fløgu og á palli. Og tá ið ein slík stjørna sum Ana Johnsson framførir sangirnar, gevur tað tónleikin eyka sjarmu og sál.

Ana Johnsson og bólkur hennara spælir væl, og tey syngja eisini væl. Ana er stjørnan á pallinum, og tað trívist hon væl við. Hon hevur sera gott samband við áhoyrararnar og stýrir showinum alla tíðina.

Ana Johnsson er longu blivin kend kring heimin, men hon hevur potentiali til nakað enn størri.

# MCFADDEN VERULIGUR Í NIBE



Eftir at hava spælt sangir hjá sær sjálvum, Westlife og eitt coverlag, setti Brian McFadden punktum fyri einari frálíkari framførslu við sínum kendasta sangi, Real To Me

Tíðindatænastan á Nibe Festivalinum skrivaði um framførsluna hjá Brian McFadden, at tað var størsta avbjóðingin hjá fyrireikarunum higartil, tí Brian McFadden er størsta navnið, sum nakrantíð hevur spælt í Nibe. Tí var nógv gjørt burtur úr fyrireikingunum til framførsluna, sum var klokkan hálvgum sjey hóskvøldið.

Og fyrireikingarnar høvdu eftir øllum at døma gingið væl, tí alt riggaði sum tað skuldi, og áhugin fyri framførsluni var sera stórur.

Framførslan hjá Brian McFadden var fyrstu løtuna merkt av, at ljóðið ikki var í topp, tí eingin verulig ljóðroynd hevði verið frammanundan, men ljóðið gjørdist skjótt betur, og høvuðspersónurin á pallinum var ongantíð nervaður av hesum.

Hann legði harðliga fyri sanginum Irish Son, og teir fyrstu sangirnir vóru lívligir, áðrenn hann nakrar ferðir undir framførsluni setti tempoið eitt sindur niður við teimum friðarligu sangunum hjá sær.

## Sang hitt saman við áhoyrarum

Brian McFadden spældi allar sangirnar á sínari fyrstu soloútgávu, og hann hevði eisini onkrar spildurnýggjan sang við sær. Harafturat treiv hann eisini í onkur av teimum gomlu Westlife-hittunum – til dømis Flying Without Wings – og ikki minst tá sungu fólk væl við.

Men teir kendastu sangirnir hjá McFadden fingu eisini áhoyrararnar á flog. Tá ið McFadden spældi balladuna Almost Here, sum er ein duett við unnustu hansara, Deltu Goodrem, læt hann áhoyrararnar syngja partin hjá Deltu, og tað var ein øðrvísi og stuttlig framførsla. Helst hevði tað verið betur at havt songkvinnuna sjálva á palli, men tá ið tað ikki kundi lata seg gera, so var hetta eitt gott trekk av íranum.

Brian McFadden treiv eisini í eitt coverlag, og tað var kendi sangurin Mustang Sally hjá The Commitments, og hendan sangin tulkaði hann yvirraskandi væl. Røddin hjá McFadden er als ikki bara til fittan popp, hon er eisini

# HØGNI FEGIN UM AT SPÆLA Í NIBE

Tvær ferðir hevur hann spælt við Clickhaze í Nibe, men um vikuskiftið spældi Høgni Lisberg aftur á Nibe Festivalinum – men hesaferð við sínum egna tónleiki og egna bólki



Nibe: Høgni Lisberg og tónleikararnir í bólkinum hjá honum komu longu hósdagin til Nibe Festivalin, og teir lurtaðu eftir tónleiki á festivalinum, meðan teir bíða eftir at sleppa á pallin leygardagin.

Høgni Lisberg spældi í Mánalýsisteltinum leygarkvøldið klokkan trý korter til nýggju, og tað var ein sera góð plasering. Hann var eisini førdur fram ovarliga á plakatunum hjá festivalinum, og tað var hann fegin um.

– Eg havi spælt her tvær ferðir við Clickhaze, men hetta er eitt sindur øðrvísi, tí nú verður tað við mínum egna bólki. Eg fari at spæla fleiri sangir, sum koma út á nýggju fløguni hjá mær, segði Høgni Lisberg áðrenn framførsluna í Nige.

Fløgan hjá Høgna kemur væntandi út seinni í hesum mánaðinum, og fleiri av tónleikarunum, sum hava verið við at spæla tónleikin inn, spældu eisini saman við honum í Nibe.

Jens L. Thomsen spældi bass, Hans Poulsen keyboards, Allan Tausen gittar, Brandur Jacobsen trummur og Høgni Lisberg sang og spældi gittar.